# Hósdagur 13. apríl

**Útvarp Føroya**

7.00 **Tíðindi**(e)
7.03 **Morgunlestur** - Henry Debes Joensen á Argjum lesur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Morgun Føroyar** - Hilmar Jan Hansen leggur til rættis
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Henry Debes Joensen á Argjum lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Tilvera - Hetta er endin, men fyri meg byrjanin til lívið** (e) - Armgarð Arge leggur til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Tónleikur í trettan øldir** (e) - 7. sending. Kári Sverrisson stílar fyri
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e) - Sigmar Bláberg skipar fyri
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindini**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stíla fyri
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Mildrið Jacobsen leggur til rættis
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Dalurin fagri** - 16. partur av skaldsøgu eftir Gunnar Hoydal. Hans Tórgarð lesur.
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið**- Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Tónleikur**
14.00 **Brot og bitar** (e)
14.30 **Barnalindin**
17.00 **M & M** - Sending fyri ung
17.55 **Dagsins orð**
19.00 **Sjómanssendingin »Vitin«** (e)
20.00 **Barnalindin** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð**(e) - **Lovsangur**
21.00 **Bønarlinjan** v/ ym. luttakarum

**Rás 2 FM 102**

8.00 **Morguntónleikur -** Lættur blandaður tónleikur
9.45 **Orðið** -Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Birgir Beinleiðis**- Beinleiðis sending við tónleiki og práti. - Birgir Sondum leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Dansitónleikur fyri vaksin** v/Ronald (8)
13.00 **Føroyskur tónleikur**
14.00 **Laila Beinleiðis**- Beinleiðis country-sending
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Lættur tónleikur**
16.00 **KT R@sin** - Kunnandi ungdómssending fyri ung og eldri. - Um kunningartøkni í víðastu merking í samstarvi við Føroya Tele
17.00 **Barnaløtan**
17.30 **Barnasangir**
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Lættur tónleikur**
19.00 **Hans og Dýrini** - Um fuglin í bjørgunum, sílini í ánni, kettur og hundar og onnur dýr. - Hans Joensen prátar við fólk um náttúru og umhvørvi.
20.00 **Poppur -** Frá fyrr ella seinni
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Orðið**(e) **-** Bíbliulestur v/Anju Hansen
21.30 **GirlZone -** Beinleiðis ungdómssending við gestum. - Anita Ottosen og Súsanna Clementsen leggja til rættis. - Telf. 359999, fax 359990 ella E-mail: ras2@ras2.fo

**SvF**

18.15 **Upp á tá** - fimleikur í SvF
18.30 **Øskufía** 15:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika** við Grannum okkara
20.50 **20. øld** 11:12 - ensk dokumentarrøð
21.45 **Margretha drotning tekur ímóti** 5:5
21.45 **Krimitímin: Ruth Rendell: Mutur og glatan** 1:2
22.40 **Ferðafrásøgn: Norðurindia**
23.25 **Liðugt**

**Eurosport**

7.30 **Cycling**
9.00 **Trial**
10.00 **Cart**
11.00 **Motocross**
11.30 **Snowboard**
12.00 Live - **Tennis**
15.30 **Cycling**
17.00 **Trial**
18.00 **Motorsports**
19.00 **Billiards**
21.00 **Boxing**
22.00 **Sumo**
23.00 **Motorsports**
0.00 **Football**
0.30 **Close**

**TV3**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.00 **TV-shop**
8.05 **Hvide Løgne**
8.30 **Alle tiders barnepige**
9.00 **Ricki Lake**
9.55 **Baywatch**
10.50 **Horton-sagaen**
11.40 **Horton-sagaen**
12.30 **Drew Carey**
13.00 **Sjov og Spas**
13.25 **Panter-tanter**
13.55 **Det lille hus på prærien**
14.50 **Interne affærer**
15.45 **Sjov og Spas**
16.15 **Ricki Lake**
17.10 **Dagens Nyheder på TV3**
17.20 **Sportsnyheder**
17.25 **Vejret**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Vild med dig**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Efterlyst**
20.00 **?**
20.30 **Modelliv**
21.00 **Heksene fra Warren Manor**
22.00 **SexOrama**
22.30 **Dagens Nyheder på TV3**
22.40 **Drew Carey**
23.10 **Vore værste år**
23.40 **Ti tommelfingre**
0.10 **Monty Pythons flyvende cirkus**
0.45 **Ellen**
1.10 **Caroline, karrieren og kærligheden**
1.40 **Hvide Løgne**
2.10 **Godnat**

**BBC World**

0.00 **News – Weather**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **Holiday**
2.00 **News – Weather**
2.30 **Reporters**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **Top Gear**
6.00 **News – Weather**
6.30 **The Money Programme**
7.00 **News – Weather**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **News – Weather**
8.30 **Talking Movies**
9.00 **News – Weather**
9.30 **The Money Programme**
10.00 **News – Weather**
10.30 **HARDtalk**
11.00 **News – Weather**
11.30 **Holiday**
12.00 **News – Weather**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **News – Weather**
13.30 **HARDtalk**
14.00 **News**
14.15 **World Business Report – Weather**
14.30 **Top Gear**
15.00 **News – Weather**
15.30 **The Money Programme**
16.00 **News – Weather**
16.30 **Asia Today**
17.00 **News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **News – Weather**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **News – Weather**
20.30 **Click Online**
21.00 **News – Weather**
21.30 **World Business Report**
22.00 **News – Weather**
22.30 Science World
23.00 **News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC Prime**

0.00 **TLZ: »Watergate – Masacre«**
1.00 **TLZ: »History File – Black People of the«**
1.20 **TLZ: »Landmarks – Timelines«**
1.40 **TLZ: »Landmarks – Timelines«**
2.00 **TLZ: »Hidden Power«**
2.30 **TLZ: »The Vernacular Tradition«**
3.00 **TLZ: »Robot in the Parlour«**
3.30 **TLZ: »Out of the Blue«**
4.00 **TLZ: »Boungiorno Italia – Casa, Famiglia e Lavoro«**
4.30 **TLZ: »Boungiorno Italia – Com'era una Volta?«**
5.00 **TLZ: »The Business Hour«**
5.30 **TLZ: »Look ahead«**
6.00 **The Aimal Magic Show: »The Good Egg Show«**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Run the Risk**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »WRVS Trolley Ladies«**
8.20 **Real Rooms: »Crouch End Bedroom«**
8.45 **Kilroy: »Can't get out of Debt«**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Roadshow**
10.30 **Great Antiques Hunt: »Edinburgh«**
11.00 **TLZ: »The Arts and Crafts Show«**
11.30 **Can't cook, won't cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Real Rooms: »St Albans Japanese Room«**
13.00 **Style Challenge: »WRVS Trolley Ladies«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Gardeners' World**
14.30 **Can't cook, won't cook**
15.00 **The Aimal Magic Show: »The Good Egg Show«**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Run the Risk**
16.00 **The Biz**
16.30 **Top Of the Pops Classic**
17.00 **Only Fools and Horses: »Happy Returns«**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Vets in Practice: »Under Pressure«**
19.00 **You rang M'Lord: »Come to the Ball«**
20.00 **Casualty: »Full on«**
21.00 **Goodies: »It might as well be String«**
21.30 **Top Of the Pops Classic**
22.00 **The Precious Blood**
23.15 **Holiday Outings: »Driving USA«**
23.30 **Songs of Praise**

***SvF – Hósdagur kl. 21.45:***

### *Krimitímin:*

## *Ruth Rendell: Mutur og glatan 1:2*

Ensk krimistuttrøð frá 1997

Hin eitt sindur góðtrúgvni Nicholas er vónleyst forelskaður í Emmu, sum er eitt sindur eldri enn hann. Emma keðir seg hinvegin í hjúnarbandinum og hevur tikið samband upp við pápa Nicolas, Nick. Men ein dagin ger hon tað liðugt við teir báðar, fyri at byrja av nýggjum. Dagin eftir verður hon funnin deyð niðri á havnalagnum í býnum.

Leikarar: James DæArcy, Paul Freeman og Tim Woodward.

Leikstjórn: Mike Vardy eftir kriminalsøgu hjá Ruth Rendell.

***TV3 – Hósdagin kl. 20.00:***

## *Kathleen på Korfu*



Í sendingini síggja vit, hvussu tað gongur fyri seg, tá fyrrverandi sjónvarpsverturin og Robinson-luttakarin, Kathleen Kai-Sørensen fer til griksku oynna, Korfu, har hon skal vera við til at gera ein kalendara.

Vit síggja, hvussu Kathleen og upptøkuliðið ferðast rundt á vøkru strendunum, og eisni síggja vit hana í vatni, á eini balkon og í einum alt ov heitum baði. Eisini greiður Kathleen frá hugskotunum aftan fyri einstøku myndirnar, hví hon nú er model og at hon í veruleikanum er sera smæðin.

***TV3 – Hósdagin kl. 20.35:***

## *Modelliv*

Laura er í Kina, har hon skal luttaka í Supermodel of the World. Modellini skulu ganga í svimjiklæðum, og hetta dámar henni einki, og hon ger eisini vart við sína ónøgd.

Mamma Nadia hevur sæð eina sending, sum sýnir veruliga modellívið, og nú vil hon hava at vita, um dóttir hennara megnar at stýra sær í yrkinum.

Anne gongur model á Trend-Showinum í



Bella-Centrinum, men hon leggur lítið í hesa uppgávu. Hon er von við at starvast uttanlands, men pengarnar noyðist hon at finna sær.

Yrkisleiðin hjá Tue gongur ov seint fyri seg, og nú ætlar hann sær at royna seg uttanlands. Franne og Tue leggja tískil eina ferð til rættis, soleiðis at hann kann vitja ymsar útlendskar fyritøkur.

***TV3 – Hósdagin kl. 21.05:***

## *Heksene fra Warren Manor*



Amerikonsk sendirøð

Prue drepur eina leigudrápskonu, tá henda roynir at drepa Prue og systrar hennara. Saman við Morris royna systrarnar nú at finna út av, hvør stóð aftan fyri drápsroyndina. Undir kanningararbeiðinum halda brotsmenninr, at Prue er leigudrápskonan, Hellfire, og hon nýtir hetta til egnan fyrimun, soleiðis at hon kanska kemur til botns í málinum.

***TV3 – Hósdagin kl. 22.05:***

## *SexOrama*



Erotisk dokumentarsending

Í byrjanini av sjeytiárunum vann hugtakið »Livesex« fram í Danmark, og Istedgade var staðið, har sonevndu sexklubbarnir blómaðu saman við pornohandlum og – biografum. Í dag eru framvegis sexklubbar, har gestirnir kunnu síggja sex á pallinunm. SexOrama er eisini við, tá livesex hevur heimspremieru umvegis satelittsamband. Donsk sjónvarpssøga til hyggjarar um alt Europa.





Viðmerking:

# Føroya Lærarafelag finst harðliga at løgmanni og varaløgmanni

Landsstýrið alla ábyrgdina av arbeiðsósemjuni um fólkaskúlan

Nýggja fólkaskúlalógin er karmurin um virksemið í skúlanum, og tað er hetta virksemið, ið ásetur arbeiðið læraranna. Føroya Lærarafelag hevur rætt til at samráðast um lønar- og arbeiðsviðurskifti læraranna. Hetta er ásett í tænastumannalógini og í setanarsáttmála.

**Hetta hevur løgmaður als ikki skilt ella vil ikki skilja.**

Fólkaskúlalógin kom í gildi 1. jan. 1998, og tá byrjaðu skúlarnir at fyrireika og tilrættaleggja arbeiðið, so sum lógin fyriskrivar.

### Var tað ikki ætlanin?

Tað vísti seg, at arbeiðsuppgávurnar vóru so nógvar og tíðarkrevjandi, og tað hevur Føroya Lærarafelag gjørt vart við frá fyrsta degi.

At nýggja fólkaskúlalógin áleggur lærarum og leiðarum nýggjar og broyttar uppgávur hava eisini fyrrverandi landsstýrismennirnir í skúlamálum gjørt vart við ferð eftir ferð.

Semjan frá 31. okt. 1999 millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag, har m.o. Karsten Hansen hevur skrivað undir, sigur heilt greitt, at hesar samráðingarnar skuldu snúgva seg um allar hesar nýggju og øktu uppgávurnar í lógini.

**Tað er beinleiðis ósatt, at Føroya Lærarafelag ikki vil samráðast!**

Karsten Hansen hevur sjálvur undirskrivað semjuna frá 31. okt. 1999, men tá hann ikki vil halda seg til hetta — nevniliga nú at samráðast um "kardinalpunktini" (fylgjur av nýggju fólkaskúlalógini) hjá okkum — hvat er so at gera.

### Tað skortar ikki upp á vilja Føroya Lærarafelags!

Men løgmaður, varaløgmaður og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum koma nú sum kettur úr høvdatrogi og siga, at Føroya Lærarafelag ikki hevur rætt til at samráðast um arbeiðsviðurskiftini hjá lærarum og leiðarum, sum eru broytt av nýggju lógini. **Hví siga teir hetta nú?** Hví hevur Fíggjarmálastýrið so sitið á fundi við Føroya Lærarafelag í næstan eitt heilt ár og samráðst um júst hesi viðurskifti? Og hví sótu Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag eina heila viku saman við semingsmonnunum og viðgjørdu hetta meir álagda arbeiðið sambært nýggju fólkaskúlalógina? Uppskotið til semju frá semingsmonnunum vísir nevniliga á, at arbeiðsviðurskiftini eru við í samráðingunum!

**Um hetta eru treytirnar, so hevur Føroya Lærarafelag samráðst undir skeivum fortreytum!**

Semjurnar millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið mótprógva júst hesar pástandir hjá løgmanni og varaløgmanni. Teirra úttalilsi í fjølmiðlunum vísa heilt greitt, at teir ikki hava sett seg inn í málið, tíverri.

Hetta er valdsvreingjan av grovasta slag.

**Og, hvør hevur evstu ábyrgdina? Løgmaður!**

**Við heilsan**
**Føroya Lærarafelag**

# Hvat vilja vit sum fólk?

Hettar er ein spuringur, sum eg og mong við mær seta sær í hesum døgum. Grundin til at hesin spuringur er vorðin aktuelur, er alt kjakið, um fullveldisætlanina hjá Føroya Landstýri.

### Fólki hevur altíð verið tvíbýtt

Lat meg sláa fast beinanvegin, at sjálvt um eg eri sambandsmaður, so ivist eg ikki eina løtu um mín samleika, sum føroying. Tað verður lasta okkum sambandsfólkum fyri, at vera føroyingum at bana, tá ið tað snýr seg um okkara mál og mentan/samleika.

Eg fari ikki at brúka hesa grein til verjiamboð, tí tað kann væl vera, at vit til tíðar hava verði nakað svartskygd, tá ið tað ráddi um flaggið og málið, Men eitt vil eg bara sláa fast, og tað er, at tá ið tað snýr seg um fólkaatkøvðuna í 1907 um rúsdrekkaforboð í Føroyum, kann eg lyfta høvdi høgt sum sambandsmaður. Sama tá tað snýr um at fáa smámannium jørð, so hann kundi hava ein kúgv, og breyðføða seg og síni.

### Farið er farið

Nú er so tíðin komin, at vit líta frameftir sum tjóð, og siga at farið er farið.

Hvat er so at gera hjá okkum. Jú ein kundi tikin táttin upp hjá føroyingafelaginum, av 1889, tá ið vit stóu saman sum ein maður. Eg kann til stuttleikar nevna endamálorðingina hjá felaginum (við formannsins lovið), tað hevur hann nokk ikki nakað ímóti:*"At fáa Føroya mál til æru og at fáa føroyingar at halda saman og ganga fram í øllum lutum, at teir mugu verða sjálvbjargnir"*. So kann ein spyrja seg sjálvan, um vit hava nátt á mál sum tjóð, og har má svari vera nei.

Men lat meg siga, at tað er eitt mál vit øll í felga kunnu seta okkum, samríkisfólk sum fullveldisfólk, og tað er at gera Føroyar sjálvbjargnar. Sjálvbjargni er jú ikki tað sama sum fullveldi, men meir at vit skulu gjalda tað, vit eiga, og ikki sum nú, skelda hvønn annað fyri henda blokk ið vit fáa. Mær vitandi grætur eingin føroyingur tá ið hann fær pengar.

Tí skal mín áheitan vera til løgmann: Tú tosar sum ein ið ynskir semju, og tú vilt eisini fara eftir semju. Er her ikki nakað, at taka



fat í? Tí tá ið vit eru vorðin sjálvbjargin, so kunnu vit taka kjakið upp, um vit vilja verða utttan fyri ella inna fyri Ríkisfelaskapin.

Vit byggja heldur einki upp, við at fáa okkum danskarar sum fíngindar, og eitt er sikkurt, at nú roynir pressan, at tevja blóð, hava uppger við danskarar, ella hvat annað vit kunnu skíra tað, sum fer fram í dag. Øll minast vit bankamál hvussu vit tevdu blóð tað ferðina, men nú er tað loyst, og nú skal tað verða NATO máli. Men einki við at fara til botns í tí svansi sum fer fram í Føroyum, eitt nú við fiskivinnumálinum. Syndabukkar kann ein altíð finna, um ein ynskir tað. Vit mugu fyrst gera upp við okkum sjálvi.

Lat meg til seinast endurgeva ein av undangongumonnum í føringafelaginum, tá ið hann var staddur í Svøríki, og yrkti um føðilandi, og vesturættina, har hann sigur í seinasta ørindi, at hann ei Føroyum skomm vil gera, og tað vil eg so sannliga ikki. Eg ynski fyrst og fremst at búgva í einum landi harið fólk liva í sátt og semju, og hvar tað ikki ræður um at finna sær ein felags fínngida, og tí kasta ábyrgdina frá sær, ið vit hava í dag.

Tú byggir ikki nakað trúvirði, við nakran, við at geva ørðum skuldina, fyri tað sum ferð fram í eins egna landi

**Jóhan Petur Johannesen**
**Formaður hjá Ungmannafelagnum samband**

## *Kjakið fer fram í Sosialinum*

# Dagføra lóggávuna um sjúkur hjá djórum

*Í kjalarvørrinum av sera nógvu fráboðanum síðstu árini, bæði viðvíkjandi salmonella, neytaøði í Stóra Bretlandi, dioxin í Belgiskum høsnarungum, og nú neytaøði í Danmark, hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan tikið avgerð um, at alt kjøt og úrdráttir av kjøti skulu merkjast við upprunalandi, sigur Finnbogi Arge í svari*

ÓLAVUR Í BEITI

Dan R. Petersen spurdi herfyri Finnboga Arge nakrar spurningar, har hann m.a. vildi hava at vita, um nøkur fyribyrgjandi tiltøk eru sett í verk, nú neytaøði er staðfest í Danmark? Eisini vildi Dan R. Pretersen hava at vita, um tann føroyski myndugleikin hevur nakran ávísan politikk mótvegis londum, ið nýta tað í viðmerkingunum nevnda fóður? Og kann landsstýrismaður við vissu siga, um fóður til føroysk neyt er vandaleyst? At enda spyr Dan R. Petersen, um tey tiltøk, ið sett eru í verk ímóti ridludkriða í Føroyum, eru nøktandi?

### Brúkarin kunnigur

Í svari sínum, sigur Finnbogi Arge m.a., at í kjalarvørrinum av sera nógvu fráboðanum síðstu árini, bæði viðvíkjandi salmonella, neytaøði í Stóra Bretlandi, dioxin í Belgiskum høsnarungum, og nú neytaøði í Danmark, hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan tikið avgerð um, at alt kjøt og úrdráttir av kjøti skulu merkjast við upprunalandi.

– Avgerðin varð formliga tikin 15. mars 2000 og fráboðað øllum heilsølum og størri handlum, sum eru í fráboðanarskipanini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Fyritøkurnar hava fingið freist inntil 31. mars 2000 at fáa viðurskiftini í rættlag.

– Eftir hendan dag er føroyski brúkarin kunnigur við upprunan av tí kjøti og kjøtúrdráttum, sum hann keypir. Hetta merkir eisini, at næstu ferð ein fráboðan kemur fram í fjølmiðlunum, so veit føroyski brúkarin, um hann hevur keypt vørur av hesum uppruna, sigur Finnbogi Arge.

Og viðvíkjandi spurninginum um fóður og kraftfóður til neyt og seyð, svarar Finnbogi Arge, at tað verður bert innflutt úr Danmark og øðrum Norðurlondum. Í Føroyum eru eingi lógarkrøv galdandi í sambandi við framleiðslu av fóðri.

### Ein tilburður

Viðvíkjandi spurningium um ridluskriða, sigur landsstýrismaðurin, at síðan 1995 er bert fráboðaður ein tilburður, sum førdi við sær, at seyðurin, talan var um, varð dripin og sjúkuavgerðin váttað, tá heilin á avvarðandi seyði aftaná varð kannaður. Ymiskar avmarkingar vórðu lagdar á seyðaskipanina eftir tilburðin, m.a. víðfevnt bann fyri at selja livandi seyð, og skylda til at fráboða nýggjar tilburðir av ridluskriða í avvarðandi seyðaskipan.

– Í løtuni verður arbeitt við at dagføra lóggávuna um sjúkur hjá djórum. Hetta merkir m.a., at heimild fæst fyri eini meira aktivari niðurberjing av ridluskriða, sigur Finnbogi Arge í svarinum til spurningar Dan R. Petersen's.